tíðindablaðið **sosialurin**

Postsmoga 76,
3800 Argir,
telefon 11820

Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaksstjóri og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen, Jóhann Mortensen og Jan Müller
Lýsingar: Árni Joensen
Uppsetingur: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Pappnøsin umaftur

oddagrein

AT FØROYSK millumlandasigling ongantíð hevur verið hjartabarn Sambandsfloksins og málgagn hansara Dimmalætting er einki nýtt. Øll minnast vit hvussu hetta blað royndi at bróta niður tað aðrir høvdu bygt upp við millumlandasiglingini við Smyrli. — Hvussu teir tá av øllum alvi royndu at sáa misálit og iva um framhald av hesi sigling.

TÁ SAMBANDSFLOKKURIN kom í landsstýri eydnaðist tað honum at geva hesi sigling mønustingin. Roynt var at lata útlendingum siglingina uppá Føroyar. Hin føroyska almenna strandferðslan mátti ikki fyri nakran prís fáa loyvi til at taka sær av hesi sigling. Heldur ikki var tað væl dámt tá aðrir, m.a. nakrir av manningini á Smyrli, tóku stig til at keypa skip fyri at kunna røkja eina tílíka rutu. Hetta endaði tó við, at Sambandsflokkurin var trýstur til eina loysn á skipamálinum — ímóti teirra vilja. Skip varð keypt, og verður sett í rutu í summar.

MEN IKKI nóg mikið við tað. Nú skal skipamálið forfylgjast av Sambandsflokkinum. Skitin vápn hevur altíð verið eyðkenni Sambandsfloksins — serliga undir núverandi leiðslu — og sær hesin flokkur nú sína uppgávu í, at skapa mistrúgv og misálit á hetta nýggja skipafelag, sum keypt hevur nýggja ferðamannaskipið NORRØNU. Hetta kom fram í einum lesarabrævið í Dimmalætting týsdagin, har »lesarin« hevur frætt, at svenska blaðið »Dagens Nyheter« veit at siga, at svenska skipið er keypt 30 milj. sv. krónur ov dýrt.

Í SAMBAND við málið í tinginum um eykaveðhald til nýggja skipakeypið vísti javnaðartingmaðurin Jørgen Thomsen til lesarabrævið í Dimmu, og bað hann um at tíðindini vóru kannaði. Hesa uppgávu fekk Fiskivinnustovan, og úrsliti av hesum kanningum fyriliggja í skjali í sama máli. Her verður m.a. sagt, at teir hava vent sær til Viðskiftastovuna í Keypmannahavn, men einki úrslit. Síðani varð ringt til lesistovuna í Fólkatinginum og gjørdu tey ómak at blaða seinast útkomnu »Dagens Nyheter« ígjøgnum. Einki úrslit. Triðja royndin var at venda sær beinleiðis til blaðstjóran á »Dagens Nyheter« men heldur einki úrslit. Teir mintust einki til nakra grein um Gustav Vasa.

EINA ROYND gjørdi Fiskivinnustovan aftrat. Tað var at ringja til blaðstjóran á Dimmalætting. Nú kom fram, at tað var ikki vist at greinin hevði staðið í »Dagens Nyheter« mánadagin og nú var maðurin, sum ringt hevði stórtíðindini til Dimmalætting farin út aftur at sigla, og ikki var gjørligt at fáa fatur á honum.

TAÐ SKAL ikki nógv umhugsni ella hegni til at gita, at hesin sokallaði siglandi heimildarmaður sambandsmálgagnsins man hava eitt ógvuliga neyvt tilknýti til Dimmalætting. Pappnøsin umaftur.

TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ

LITBRAGDIÐ

uppi á Hálsi

Mánadagin 18/4 og vikuna út, geva vit 20% avsláttur uppá

Teppir, vinylbelegning og tapet

Sertilboð:

3 rull. spøntapet, 5 l. veggmáling, 2 1/2 l. loftmáling og málingarulla v/ bakka.

Einans kr. 345/-

5 l. akrylmáling hálvblank til vegg.

Kr. 195/-

5 l. akrylmáling silkimatt.

Kr. 141/-

2 1/2 l. akrylmáling matt.

Kr. 75/-

LITBRAGDIÐ

v/ Ian Rasmussen
Uppi á Hálsi
Tórshavn, tlf. 16789

TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ

Rætturin til deiltíð kann føra til tvungna deiltíð

Tingið viðger í hesum døgum eitt uppskot um lóg, sum tryggjar øllum kvinnum rætt til deildartíðararbeiði.

Ivaleyst eru tað mong, ið halda hetta vera eitt gott lógaruppskot. Nógvar kvinnur ynskja at arbeiða bara ein part av degnum, oftast tær sum hava børn, tí sum umstøðurnar eru, hvílir ábyrgdin av heimi og børnum á teimum fyrst og fremst. Menn hava eisini ábyrgdarkenslu, men teir flestu meina, at ein góður pápi er ein, sum er ein góður forsyrgjari, t.d. tjenar nóg mikið til at uppihalda eini familju. Hagtøl úr Danmark og Noreg vísa, at menn ikki taka stórt meira heimaarbeiði upp á seg, um konan arbeiðir úti og tey hava børn.

Tá ið kvinnur ynskja deiltíðararbeiði, gera tær tað út frá síni egnu individuellu støðu, tí tá ber betur til bæði at kunna taka sær meira av heimi og børnum, og samstundis kunnu tær geva eitt ikast til peningainntøkuna hjá familjuni.

Men her sum í so mongum øðrum viðurskiftum er ójavni í, hvat er gott fyri heildina og hvat er gott fyri einstaklingin — og hvat ið fyri so vitt er gott fyri einstaklingin í longdini.

Tað er langt frá øllum beskorið at kunna fáa eitt arbeiði, sum í sjálvum sær gevur livinum innihald ella mennandi avbjóðingar til evni og styrki. Tað er skilligt, at tær mongu, sum hava valið millum annaðhvørt eitt útiarbeiði, ið keðir tær ella er strævið, ella meira tíð til heim og børn, velja tað seinna.

Tann samlaða arbeiðsnøgdin í samfelagnum hvørki minkar ella veksur, um vit hava fleiri deiltíðarstørv. Sum gongdin er, minkar arbeiðsnøgdin av ymsum grundum, og minni arbeiði verður at býta millum allar arbeiðandi hendur.

Tað er óhugsandi annað enn at vit í framtíðini, eins og í øðrum londum, mugu gera eitt øðrvísi býti at arbeiðinum enn tað vit hava nú. Í grannalondum okkara eru tey farin at finna møguleikar fyri, at normalarbeiðstíðin verður stytt til 6 tíma arbeiðsdag. Eisini okkara fakfeløg og politikarar fara fyrr ella seinni at noydast at taka støðu til tann

Framhald á síðu 9